HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# 2 avloysarastørv fyri laborantar

## Kemiska kanningarstovan

**Starvslýsing**
Í sambandi við at ein av okkara laborantum hevur søkt farloyvi í 1-2 ár , verður søkt eftir laboranti til kemisku kanningarstovuna á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Arbeiðið sum laborantur fevnir um vanligar kemiskar kanningar av mati, drekkivatni, umhvørvissýnum og øðrum.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Royndir innan vanligar evnafrøðiligar kanningar, góðskustýring og EDV á brúkarastøði eru ein fyrimunur.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er fulla tíð. Setanin byrjar skjótast møguligt og endar 31. oktober 2005, tó við møguleika at leingja setanina enn eitt ár.

Lønin verður í 4. lønarflokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum. Sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo.

**Umsóknin**
Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. september 2004.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Rikke Berg Larsen, settan deildarleiara, tlf. 35 64 00.

**Mikrobiologiska Kemiska kanningarstovan**
Á kanningarstovuni eru í løtuni 5 laborantar í føstum starvi, og ein akademikari. Kanningarstovan er altjóða góðkend eftir DS/EN ISO/IEC 17025 og er undir eftirlit av DANAK (Dansk akkreditering), sí www.danak.dk.

## Fiskasjúkukanningarstovan

**Starvslýsing**
Søkt verður eftir barnsburðaravloysara fyri ein av okkara laborantum.

Kanningarstovan fyri fiskasjúkur verður í løtuni umbygd og útbygd við nýggjum bioteknologiskari útgerð, sum m.a. umfatar RealTime-PCR og sekvensering.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Tað er ein fyrimunur um umsøkjarar hava góðan kunnleika um bioteknologiskar hættir og praktiskar royndir innan hetta økið. Haraftrat krevst kunnleiki til enskt, góðskustýring og EDV á brúkarastøði.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Avloysarastarvið er fulla tíð, í tíðarskeiðnum frá 1.11.2004 til 1.8.2005, við møguleika at leingja skeiðið nakað.

Lønin verður í 4. lønarflokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum. Sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo

**Umsóknin**
Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. september 2004.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Peter Østergaard, deildarleiðara ella Debes Christiansen, molekylerbiolog á 35 64 00

**Fiskasjúkukanningarstovan**
Á fiskasjúkukanningarstovan starvast 2 laborantar, ein molekylerbiologur og deildarleiðari.
Kanningarstovan er undir uppbygging. Kanningarhættir í sambandi við sjúkuavgerð eru m.a. virologiskar- (kyknukulturar), PCR-, IFAT- og ELISA-kanningarhættir.
Stórur dentur verður lagdur á RT-PCR kanningar. Útgerð er nýliga fingin til hesar kanningar, og verður hon tikin í nýtslu í næstum.
Víðari menningin av kanningarstovuni vil serliga verða at styrkja kanningarhættir fyri sjúkuavgerð í.s.v. yvirvøku av ILA og at innkoyra automatiseraða PCR uppseting fyri BKD og IPN.

# Starvsfólk

## til Teymavirkið í Runavík

Vit sóknast eftir:
**Avloysara** fyri eitt fólk í barnsburðarfarloyvi at byrja skjótast møguligt og fram til 01.06.2005. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna

**2 Jólahjálpum** til seinnapartsarbeiði og annan hvønn leygardag. Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna, at byrja beinavegin og fram til 31.12.2004.

**Vit bjóða** eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi.

**Vit vænta**, at tú ert fyrikomandi og arbeiðssamur persónur, sum eisini kann arbeiða sjálvstøðugt. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men hóast tað stuttligur.

**Umsókn** við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Teymavirkinum, Boks 210, 620 Runavík, í hendi í seinasta lagi leygardagin 18.09.2004.

**Meiri** fæst at vita við at venda sær til Maluna Nielsen ella Eyðvør Berg á tlf. 473 000.

---

*Teymavirkið í Runavík og Snørisvirkið í Klaksvík eru einastu fyritøkur í Føroyum, ið framleiða línu, teymar og togverk. Bæði virkini hava skipshandlar, har m.a. arbeiðsklæði og trygdarútgerð er at fáa. Harafturat hevur Teymavirkið búnýtis- og klædnadeild. Í alt eru 20 fólk í starvi hjá Teymavirkinum og Snørisvirkinum.*

## Umlættingarheimið Dáin, Klaksvík

# Varaleiðari

Umlættingarheimið Dáin í Klaksvík søkir eftir varaleiðara, við pedagogútbúgving, at byrja 15. okt. 2004, ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna, skiftandi vaktir, dag, kvøld, nátt og vikuskiftisvakt.

Setanar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Dáin er ein samdøgurstovnur, har børn, ung, vaksin og eldri menningartarnað koma til umlætting í styttri ella longri tíðarskeið. Talan er um bæði skipaða umlætting, har teir ávísu bólkarnir eru til umlætting hvør sær og um vanliga umlætting, har fleiri aldursbólkar eru umboðaðir samstundis. Pláss er fyri 5 fólkum í senn.

Umframt døgnumlætting hevur Dáin eisini eina dagumlætting, har 3 børn/ung koma dagliga, gerandisdagar.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 457185.

Umsóknarfreistin er 24.9.2004 og skulu umsóknir við prógvi, viðmælum v.m., stílast til:

**Stýrið fyri Umlættingarheimið Dáin**
Mýrivegur 11
700 Klaksvík

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg



MTHøjgaard



# Nýggjar íbúðir

## á Boðaneshamri í Havn






Á Boðaneshamri, Yviri við Strond, verða ætlandi bygdar 32 eigaraíbúðir. Íbúðirnar koma at standa uppi á hamrinum og fara allar at hava framúrskarandi útsýni.

Talan er um fýra sløg av íbúðum, ið verða 68 fermetrar, umframt at tær hava stóra terassu. MTHøjgaard er byggiharri, og dygdin verður sostatt sett í hásæti.

Enn eru nakrar íbúðir, ið ikki eru umbidnar. Vilt tú vita meira, ella ætlar tú at ogna tær eina íbúð, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Inni.

inni – trygt og ómakaleyst til hús

P/f Inni · Meklarafelag · N. Finsensgøta 37 · Tórshavn · Tel 320410 · Fartel 520410 · www.inni.fo